## Vegleiðing til venjingar og dystir fyri børn og ung – dagførd 16.06.20

**Leiðreglur í sambandi við venjing hjá børnum og ungum:**

- Um man er sjúkur, er man heima og møtir ikki til venjing. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Hosti, febur, høvuðpínu, mistan luktisans, mistan smakkisans, møði, vødda og/ella liðpínu/pínu í kroppinum.
- Skiftingarrúm eru stongd – leikarar skifta heima áðrenn og aftaná venjing.
- Er felagsfundur ella máltíð áðrenn/aftaná venjing, eiga bólkar á maks. 10 persónar at sita saman við í minsta lagi 1 metrar frástøðu millum hvønn leikara.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til venjing.
- Maks. 10 leikarar kunnu venja í bólki saman við einum venjara
- Maks. 8 bólkar á 10 leikarar kunnu venja á einum heilum vølli samstundis
- Í aldursbólkunum U15 og eldri kann allur leikarahópurin venja saman
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná venjing.
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir venjing.
- Allir leikarar og venjarar/hjálparfólk skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná venjing.
- Felagið skrásetur allar persónar, sum eru til staðar til hvørja venjing (navn og telefonnummar). Harumframt verður skrásett hvørjir persónar eru í hvørjum bólki á maks. 10 leikarar.

**Leiðreglur í sambandi við dystir hjá børnum og ungum:**

- Um man er sjúkur er man heima og møtir ikki til dyst. Um man ivast, er man eisini heima.
- Sjúkutekin: Hosti, febur, høvuðpínu, mistan luktisans, mistan smakkisans, møði, vødda og/ella liðpínu/pínu í kroppinum.
- Skiftingarrúm verða í størst møguligan mun ikki brúkt. Um tað er neyðugt at brúka tey, t.d. til útiliðið um langt er at ferðast, so eru í mesta lagi 10 leikarar í hvørjum skiftingarrúmi, teir somu leikararnir áðrenn og eftir dyst.
- Um skiftingarrúm verður nýtt til fleiri ymisk lið sama dag, skal rúmið vaskast/sprittast í millum dystirnar.
- Er felagsfundur áðrenn dyst, eiga bólkar á maks. 10 persónar at sita saman við í minsta lagi 1 metrar frástøðu millum hvønn leikara.
- Leikari hevur sín egna drekkidunk við til dyst.
- Bólturin kann verða ein smittukelda, og skal vaskast áðrenn og aftaná dyst
- Vestar og venjingarútgerð skal í mestan mun handfarast av sama persóni, og útgerðin skal vaskast áðrenn og eftir dyst.
- Leikarar heilsast ikki við lógvataki áðrenn og aftaná dyst.
- Allir leikarar, venjarar/hjálparfólk og dómarar skulu vaska/spritta hendur áðrenn og aftaná dyst
- Heimafelag hevur ábyrgd av at nóg mikið av spritti er í skiftingarrúmunum
- Heimafelag hevur ábyrgd av at skráseta allar persónar, sum eru til staðar til hvønn dyst (navn og telefonnummar).
- Tá kappingar eru, kunnu í mesta lagi 100 fólk verða á einum heilum vølli samstundis.
- Foreldur / áskoðarar skulu í størst møguligan mun verða uttanfyri girðingina

**Fótbóltssamband Føroya**